Edmund Joensen løgmaður heldur tað er í lagi at tingmenn fara av landinum at kunna seg við oljuvinnu har, men fyrst eiga teir at troyta teir møguleikar, sum eru her heima til tess at fáa eina størri grundvitan. Og hana kunnu teir fáa her

Edmund Joensen, løgmaður við tingmenn:

Gevið ikki umheiminum skeiv ella ørkymlandi signal

-Tað eru vit, sum skulu seta dagsskránna, og ikki fyr r enn vit hava gjørt heimaarbeiðið væl og virðiliga haldi eg tað er rætt av politikarunum hvør í sínum lagi at taka av innbjóðingum frá oljufeløgunum. Annars er vandi fyri, at teir koma at geva skeiv signal og somuleiðis at gera mun á oljufeløgunum. Vit kunnu tá missa tað trúvirði, sum vit higartil hava megnað at bygt so væl upp í felag sigur Edmund Joensen, løgmaður, sum fegin vil átaka sær at skipa fyri oljuseminari, um hetta kann vera við til at økja um vitanina hjá føroyskum politikarum til eina oljuvinnu.

JAN MÜLLER

Føroyingar skulu sjálvir seta dagsskránna, og um føroyskir politikarar hava tørv á at kunna seg meira við oljuvinnu løggávu o.s.fr., tá skulu teir fáa alla ta vitan frá føroyskum myndugleikum teir hava brúk fyri, tað verið seg oljufyrisiting, ráðleggingarnevnd, Føroya Oljuídnað og landsstýrinum, áðrenn teir fara út í onnur lond at nema sær kunnleika.

Hetta sigur Edmund Joensen, løgmaður, sum umsitur oljumál og undirgrund í Tinganesi í viðmerking til tingmannin Finnboga Arge og formannin í Føroya Oljuídnað Paula Einarsson. Teir søknaðust í samrøðum við Sosialin herfyri eftir eini positivari støðutakan frá løgmanni til, at føroyskir politikarar kunnu taka av avbjóðingum frá útlendskum oljufeløgum fyri at vitja tey og at har stáa innlit í hesa nýggju vinnu.

Mugu ikki geva skeiv og ørkymlandi signal

Edmund Joensen heldur tað vera sera avgerandi, at politikarar ikki fara í onnur lond og geva skeiv og ørkymlandi signal til mótpartin, og har hugsar hann serstakliga um Bretland, í sambandi við ósemjuna um markið.

-Hinvegin er tað umráðandi at ansa eftir heldur ikki at gera Føroyar ótrúverdugar mótvegis oljufeløgunum við tað, at ein kanska kemur at favorisera eitt oljufelag fram um eitt annað. Tað er slíkt vit mugu ansa eftir í tí støðu vit eru í í dag.

Edmund Joensen vísir á, at er talan um at útvega sær vitan, so er rætta ræðfylgjan, at tú fyrst av øllum ger heimaarbeiðið væl og virðiliga og tvs. at tú fyrst gongur út frá tí, sum vit ætla í Føroyum.

Mest umráðandi at gera okkum greitt hvat vit vilja

Vit spurdu løgmann, um hann fer at seta seg uppímóti ella mæla frá, at eitt nú tingmenn ella tingmannanevndir taka av tilboðum frá oljufeløgum at vitja?

-Eg haldi vit fyrst og fremst skulu gera tað her heima, sum skal gerast, áðrenn vit fara út og geva signal til oljufeløgini. Sjálvandi kemur ein tíð, tá tú hevur brúk fyri at royna hesar samtyktir, tvs. siggja hvussu tað virkar í praksis. Men sjálvur haldi eg ikki at tann tíðin er komin enn. Tað er ógvuliga umráðandi, at vit koma út við nøkrum rætningslinjum tvs. okkara politikki á økinum, áðrenn vit geva nøkur signal um, hvat møguliga skal henda og ikki.

Løgmaður vísir á, at tað sum Oljuráðleggingarnevndin í løtuni ger, er sjálvt grundarlagið undir tí, sum Føroyar skulu fáa burtur úr eini oljuvinnu.

Tingmenn skulu fáa alt at vita

Í samrøðunum við tingmannin Finnboga Arge og formannin í FOI, Paula Einarsson kom fram, at teir seta eitt stórt spurnartekin við, um tingmenn eru klárir til at viðgera tann stóra løgarpakkan, sum verður lagdur fyri tingið um fáar mánaðir – við teirra núverandi innliti og vitan.

Heldur løgmaður eisini, at hetta er so, ella eru tingmenn tilreiðar at taka eina avgerð í hesum stóra máli?

-Tá vit tosa um oljuvinnu, er tað umsitingin, sum fyrst og fremst tekur sær av málinum. Har sita nógvir serfrøðingar og gera arbeiðið. Alt hetta fara Vinnunevndin og tingmenn at fáa innlit í, og er tað brúk fyri tí, so fer alt løgtingið at verða tikið við í hesa kunningina – og skuldi verið brúk fyri meira enn tí, t.d. einum oljuseminari, so skulu vit eisini skipa fyri tí. Tað skal ikki skorta uppá vilja til at seta løgtingsmenn væl og virðiliga inn í hesi tingini, og eg haldi, at fyrr enn teir hava gjørt tað, er tað ov tíðliga at fara út og vitja oljufeløg. Arbeiðið hjá okkara myndugleikum eigur heldur at vera grundarlagið undir tí, sum tingmenn møguliga skulu út at siggja.

Ert tú prinsipielt ímóti, at tingmenn taka av innbjóðingum frá oljufeløgum o.l.?

-Tað skal ikki skiljast soleiðis, at eg nokti nøkrum at fara út. Um løgtingið meinar, at tað er rætt at fara út um landoddarnar, so mugu teir gjarna tað fyri mína skyld. Eg havi bert vist á, hvussu raðfylgjan eigur at vera, og eg haldi fast um, at okkara egnu oljumyndugleikar eru væl førir fyri at geva politikarunum eina grundvitan um hesi viðurskiftini. Fyrr enn tað er gjørt er eingin ídé í at fara út.

Vit mugu standa saman

Løgmaður vísir á, at tað ber ikki til, at politikararnir nú fara út í hvør sítt herðasborn við sínum oljupolitikki.

-Er tað nakað, sum vit hava gjørt okkum kendar fyri nú, so er tað hetta, at løgtingið stendur saman um ein felags oljupolitikk og marknapolitikk. Og tað er hetta, sum gevur Føroyum trúvirði, tá samanumkemur. At so nógv oljufeløg vísa áhuga fyri Føroyum er eisini eitt tekin um, at henda vinnan hevur álit á politisku skipanini í Føroyum, og vit mugu tí ansa ómetaliga væl eftir, at tað umdømið verður hildið við líka alla tíðina.

Hava longu givið grønt ljós fyri oljuvinnu

Vit spurdu løgmann, um loyvi til forkanningar, eisini merkir, at vit harvið hava sagt ja til eina oljuvinnu í Føroyum?

Tað er klárt. Endamálið er jú at gera okkum tilreiðar til at fara undir eina oljuvinnu. Tað vit gera í løtuni eru ju ein forkanning og ein fyrireiking av eini løggávu, sum skal vera grundarlagið undir allari oljuvinnu. Tað skal sjálvandi taka hædd fyri øllum teimum viðurskiftum, sum føroyska samfelagið hevur brúk fyri, nevniliga at vit í dag eru ein fiskivinnutjóð, og at vit framvegis skulu vera tað, tá oljan er uppi – at vit ansa væl eftir umhvørvinum og fyri ikki at tala um – at oljuavkastið, sum eftir okkara viðurskiftum kann gerast ógvusligt, kemur tí føroyska samfelagnum til góðar, ikki bara okkum í dag, men tað skal umsitast soleiðis, at okkara eftirkomarar eisini fáa nakað burtur úr.

Almenn stýring

Nú verður oftani tosað um frá vinnuligari síðu og frá høgrapolitikarum, at tað almenna skal ikki blanda seg men halda fingrarnar langt vekk frá vinnulívinum. Skal hetta galda fyri eina komandi oljuvinnu eisini?

Tá oljuskeið varð skipað í Lærarskúlahøllini í Havn fyri skjótt trimum árum síðani. Løgmaður er nú fúsur at taka stig til eitt líknandi skeið, er áhugi fyri tí millum politikarar (ks)